Føroya
SOSIAL-DEMOKRATUR

Blaðstjóri
VILLI SØRENSEN
telf. 2172
Postbox 76

Prent:
A. ØSTER

Fólkatingsmenninir

Í samband við setan av landskúlakonsulenti legði Rikard Long eisini uppskot á ting um, at teir lærarar ið gerast fólkatingsmenn skulu gjalda 1/3 av læraralön síni til vikar. Tað, ið vikarurin kostar útyvir hesa peningahædd skal *danski státurin* rinda. Tað er landsstýrið og tá fyrst og fremst fólkaflokksmenn, ið sett hava fram uppskotini um avtöku av ítróttaráðgevaranum, setan av landskúlakonsulenti — og har uppi í uppskotið um, at föroyskir fólkatingsmenn skulu hava somu rættindi og somu lönarkor sum danskir fólkatingsmenn. Danski statsurin rindar hvört einasta oyra, ið fólkatingsmenninir kosta.

Nú ger Dagblaðið ögilig álop á hetta uppskot, ið partamaður teirra Rikard Long hevur lagt fyri tingið.

Men hin djúpa orsökin til skriving Dagblaðsins er sjálvandi einans tann, at ein maðurin, ið kemur undur hesa »ajourföringina«, ið sum sagt ikki kostar samfelaginum *eitt einasta oyra*, er P. M. Dam.

Hví drekka fólk?
Hvat er alkoholisma?

Heimsheilsusamskipanin kunngerð nú frágreiðingina frá tjakinum á Keypmannahavnar fundinum í 1951.

Hví drekka fólk? Hvussu verður ein vanadrankari? Hvörji verða alkoholist Er alkoholisma ein brotsgerð ella ein sjúka? Ber tað til at vinna á alkoholismuni?

Hesar spurningar og nógvar aðrar hevur S. T.ar Heims-heilsusamskipan roynt at svarað. Fundur varð hildin í Keypmannahavn í 1951. Serfröðingar í alkohol- og alkoholisspurningum allastaðni úr Europu komu saman undir vertskapi WITO's. Tilfarið, ið kom fram á fundinum, er eftirkannað og sent út sum frágreiðing, ið kann kanningum.

Í dag veit ein, at drankarar ikki uttan víðari kunnu metast sum ódygdarmenniskjur. Ein lítur at teimum sum sjúk menniskjur, og tað krevjast aðrar fyribyrgingar enn tær, ið ofta verða nýttar: ikki politi og fongsul, men læknahjálp, sjúkrahúsupphald, medisin psykoterapi og endursosialisering. Neyðugast av öllum er tað fyribyrgjandi arbeiðið.

Eitt sindur um drykkjuskap.

Ymsastaðni sigur frágreiðingin, eru drykkjuvanar eitt takksamt tjakevni, ið lættliga tekur upp kappingina við politikk og veður og vind. Hvörji góð ráð geva fólk hvörjum öðrum? Jú, nökur siga t. d.: Ver bert lívligur, so merkir tú einki. Tá ein dansar, tolir ein rúgvuna av whisky.

Læknarnir og fysiologarnir siga, at hetta er eitt undantak. Um hann, ið dansar, kennir seg minni rúsaðan enn vinirnir, ið verða sitandi, so er tað ikki tí hann »dansar tað av sær«. So er tað bert tí, at hann ikki hevur stundir at drekka so nógv sum hinir. Royndir vísa, at alkoholið ikki brennur skjótari av öktum vöddaarbeiði. Likamið letur bert eitt lítið sindur av alkohol frá sær beinleiðis, t. d. við andadráttinum. At byrja við fer alkoholbrenningin einans fram í livrini, ikki í vöddunum. Ikki fyrr enn livurin er liðug við sítt arbeiði, er ein komin útum brennivínsins ávirkan stutt sagt.

Bularevnini eru av avgerandi týdningi fyri hvat ein tolir av alkohol: ein stórur tjúkkur maður tolir betur nökur glös enn lítil og klænur. Eiturvirkan alkoholsins minkar sjálvandi eisini, um ein blandar eitt sindur av vatni uppí. Seks smáir whisky-soda vilja ikki kunna gera so nógv um seg sum seks smáir, men sterkir whisky-snapsir. Tá ið alkoholið virkar sterkari niður á fastandi hjarta, enn tá ein etur samstundis, er tað tí, at föður seinkar alkoholupptökuni í likamið.

Hví drekka fólk?

Hví drekka fólk? spyr frágreiðingin og svarar: Ivaleyst ofta fyri at njóta alkoholsins doyvandi ávirkan á bæði sálarlig og likamlig brek, tess lutvísa skerjan av nervaarbeiðinum og öðrum. Ein heldur seg vera mentan at gera alt, tá ein er ávirkaður av rúsdrekka, ein fær avlop av megi, rýmir frá gerandisdegi sínum og sínum sorgum og sveimar eina lötu í einum hugflogsheimi.

Men tað eru ikki öll, ið drekka av hesum orsökum, og serfröðingar royna í dag at fáa greitt, hvat tað er, ið skilir tann mannin, ið eftir öllum at döma einaferð vil gerast alkoholistur, frá honum, ið ansar sær í sínari rúsdrekkanýtslu. Er tað serlig slög av fólki, ið gerast alkoholistar? Serfröðingar halda seg hava funnið tekin, ið hella tann vegin, men eru ikki komin til nakað endaligt úrslit í hesum spurningi. Tílík eru fólk við sjónskum minnilutakenslum, við törvandi mátahaldsevnum. Onnur eru tílík, ið hjálpt av alkohol royna at vinna á sínum truplu sinnisrörslum og persónligu trongdum. Aftur ímóti hesum báðum slögum er vertskapsmaðurin, hvörs »góðalagbarometur« sum oftast er hægri enn hjá vanligum menniskjum. Hann byrjar at drekka av berum vertskapskæti og so kemur dagurin, tá einki mark er fyri honum.

Royndir við kettum.

Samband psykisku trongdunar við ómátahildnan drykkjuskap eru prógvað við royndum við kettum. WHO-frágreiðingin sigur frá, at nakrar kettur skuldu royna at finna teirra föði á torföran hátt. Síðani vóru tær gjördar bangafullar, hvat orsakaði, at tær hövdu ilt við at greiða royndina við at finna fram at föðini. Tað gekk tó frægari, tá ið tær hövdu fingið eitt sindur av alkohol. Seinni skuldu tær velja ímillum reina mjólk og mjólk við alkohol í. 10 av 16 »neurotiskum« kettum vildu heldur hava mjólkina við alkoholinum í og lærdu skjótt at finna hana. Tá ið ketturnar aftur hövdu vunnið á »neurosuni«, fóru tær at drekka tað reinu mjólkina.

Tá drykkjuskapurin gerst ovurstórur

Frá alkoholismunar ymisku orsökum — fysisku, psykisku, sosialu o. s. fr. kemur týðiliga fram hetta sermerki: hvat enn kann hava leitt drankaran á byrjunarleiðina, so er tað sjálvur drykkjuskapurin, sum so við og við fær hann at ökja um drykkjuskapin út um tað mark, hann tolir »Timburmenninir«, trupulleikarnir í heiminum og á arbeiðsplássinum, glósurnar frá vinmonnunum o. s. fr. fáa hann at drekka enn meir, tá hevur alkoholtrongd hansara náað tí sjúkliga. —

Teir ymisku spurningarnir í samband við alkolismuna koma til viðgerðar á alheimsfundi millum serfröðingar í Hollandi í mars-apríl í ár.

Kommunuskúlin í Havn.

Arbeiðið at gera nýggja kommunuskúlan lidnan verður nú útboðið. Kjallarahæddin er liðug. Hetta arbeiðið kostaði 280.000 kr. Liðugur kemur skúlin at kosta 2.150.000 kr. Peningurin er fingin á henda hátt: í skúlabyggigrunninum vóru 300.000 kr. Fíggjarætlan 1953/54 100.000 kr. Á komandi fíggjarætlanum til 1955 verða 450.000 kr. studningur frá lögtinginum 400.000 kr. studningur frá státinum 400.000 kr. og síðan lán 500.000 kr.

Býráði vil nú fáa teknað eitt obligationslán, 400.000 kr. stórt, renta 6 %.

Skúlin verður liðugur um heystið 1956. Í skúlanum vera 20 skúlastovur, fimleikarhöll, træsmiðjuhöll, skúlakökur o. m. o. höli.

Skúlabarnatalið við allar skúlarnar í Havn, kommunuskúlan, realskúlan, nonnuskúlan og privatskúlar er 950. Hesin nýggi skúlin verður at rúma 630 börnum.

Vísdómsorð

Fyrsta glasið: Maðurin tekur víni. Annað glasið: vínið tekur vínið. Triðja glasið: vínið tekur mannin.

Tann största av öllum gleðinum er sjálvgleðin, hon ger allar hinar til einkis.

Tað finnast tey menniskju ið einans kenna tær gleðirnar, sum tey eru örg um aftaná, tí

Hjartans tökk

tit öll, sum mintust meg við gávum og telegrammum á 70-ára föðingardegnum hin 14.-1.-1954.

Margretha Kjærbech,
Sumbör

kvinnan

Hvussu við hárinum?

Hetta er sjálvandi ein átrokandi spurningur hjá kvinnum.

Vit loyva okkum her at endurprenta ein stubba úr »Kvinden« í »Social-Demokraten«, ið umröðar hetta evni:

Ikke opad længere

Det kan jo ikke nytte at sige, at frisuremoden kun er noget, der angår mannequiner, frisörer og skuespillerinder. Man behöver bare at se på en köbenhavnsk gade i myldretiden: 7 af 10 köbenhavnerinder har håret redt væk fra örene og — så godt som det nu lader sig göre — opad bagtil. Det er kort, men ströget opad, som Britta Jærndal viser det på det lille billede.

Men nu er det ikke moderne længere. I stedet for at börste opad og ærgre sig over nakketjavser, som prinsipielt ikke vil opad, skal håret nu tværtimod nedad i nakken. De 15 danske frisörer, der er tilsluttet Syndicat de la Haute Coiffure, er lige kommet hjem fra Paris og viste i går de nye frisurer. »La Fronde«, på nogle af de köbenhavnske mannequiner.

Håret skal stadig være kort »fortonende sig i en længde fra otte til to centimeter ned mod nakken, yderligere udarbejdes de i krøller og i effilerede spidser«, hedder det i frisörsproget.

Sagt på er sprog for ikke-fagfolk er det iöjnefaldende ved de nye frisurer, at örene er helt dækket, at håret er redt nedad og fremad, at det »italienske kunstnerhår« stadig er moderne, og at der er»bolleret« i nakken og i sideme som i tyverne.

Reytt hár.

Tað tekur til, at reytt hár verður at hava valdið í 1954. Bæði *Rita Hayworth* og *Eva Bartok* hava — eftir at hava vrrið bæði blondin og dimmhærd — avgjört at bera reytt hár. Tann kenda mannequinin í París, *Luzy Parker*, er reyðhærd, og tann leiðandi mannequinin í London, *Fiona Cambell-Walter*, er eisini vorðin reyðhærd — í hárfriðkanarhöllini.

Januar

18. jan. Útlendskur postur til Klakksvíkar við Polo. — Oyrnafjall á veg úr Hamburg til Dunkerque.

19. jan. Fulla mánamyrkingin sást ikki so heilt væl. At byrja við var toluliga klárt, men meðan almyrkt var, kom mánin bert hendinga ferð undan. — Drottningin farin úr Keypmannahavn kl. 18. — Tinganes farin til Noregs við tunnu- og kassafiski, tók post við. —

20. jan. Bildeild Havnar arbeiðsmannafelags hevur fund um bilkoyringina. — B 36 byrjar innanduravenjingar í Fimleikarhöllini — Skonnartin Frida komin við stykkjagóðsi o. ö. til Mouritzen. — Jóannes Paturson út aftur at veiða eftir at hava verið inni á Siglifjörðinum. Hevði fingið trolið um skrúvuna. — Reiðarapartafelagið Tórshavn hildið uppat. —

21. jan. Seyrvingar sigast at hava í umbúna at keypa trolaran Guttaberg frá Sjóvinnubankanum fyri 100.000 kr. — Norski báturin »Tejo« komin eftir fiskafarmi av Klakksvík. Oyrnafjall komin til Caen á veg til Rouen. —

25 ár umliðin síðan Klakksvíkarpresturin N. J. Rasmussen tók við prestastarvi á fyrsta sinni.

23. jan. Asbjörg Samuelsen úr Havn og Erik Rasch verða vígd í Herlev.

24. jan. N. J. Rasmussen, prestur verður 48 ára gamalur. — Hjúnini Sigrid og Jógvan Simonsen, keypm. Saltangará halda silvurbrúðleyp.

26. jan. Missiónsvika á Tvöroyri í dögunum frá 26—31 jan.

30. jan. G. H. M. hevur gamla manna dans

31. jan. Klakksvíkar Fiskivinnufelag (Barmur) hevur aðalfund í Samkomuhúsinum.

»Norðstjörnan«, ið roynir undir Föroyum, var á Havnini í gjár. Hevði fingið umleið 600 ks. Ferð útaftur at veiða.

Drottningin kom ígjár.

Tjaldur fór úr Keypmannahavn ígjárkvöldið.